gult cyan magenta svart

Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini Ítróttasosialin á alnótini www.sosialurin.fo

Skrúva setur á Svangaskar›i

Vinnulívi› í Eysturoy og Nor›oyggjum hevur stu›la› kravdu n‡ger›ini á Toftum, har teir eisini hava ætlanir um at leggja tak á ásko›araplássini

Mikukvøldi› í komandi viku skal KÍ spæla Europa Cup dyst á Svangaskar›i. Ta› er einki óvanligt í tí, at Europa Cup dystir ver›a spældir á Toftum. Sovornir dystir hava veri› har á hvørjum ári sí›ani 1992, tá júst KÍ var fyrsta meistarali›i›, sum royndi seg í Europa Cup.

Sí›ani tá er nógv vatn runni› í ánni, og krøvini frá FIFA og UEFA til kringumstø›urnar á stadion eru fleiri fer›ir økt og broytt.

Í fjør var greitt, at ta› í framtí›ini ikki fór at bera til at spæla altjó›a dystir, um ta› ikki vóru setur til hvønn einstakan ásko›ara. Á Svangaskar›i hava ta› veri› beinkir til onkra sta›ni millum seks og sjey túsund ásko›arar, men har hava eingi setur veri›.

Nú ver›ur bøtt um hetta, og tá KÍ og Rey›a Stjørna úr Beograd fara á vøllin mikukvøldi› fara ásko›ararnir at sita á setrum.

Hóskvøldi› í fóru toftamenn undir arbei›i› at skrúva og seta upp. Setrini, sum eru blá á liti, eru keypt úr Danmark, og skinnararnir, sum tey skulu skrúvast á, eru keyptir í Onglandi. Í alt fevnir ætlanin um gott og væl um f‡ra túsund sitipláss.

Stu›ulin

Samla›i kostna›urin er mettur at vera stívliga eina millión krónur. Toftamenn hava fingi› tey 30 prosentini í stu›li frá landsmyndugleikunum, sum sambært ásetingunum kunnu veitast í sovornum førum.

Toftamenn bera ein part av kostna›inum sjálvir, men ta› hevur eydnast teimum at fáa umlei› somu upphædd í stu›li frá stovnum og feløgum, sum teir hava fingi› í stu›li frá tí almenna:

– Vit hava søkt um stu›ul frá vinnulívinum, og ta› hevur veri› hugaligt at síggja, at áhugin fyri at stu›la hevur veri› gó›ur, bæ›i her í oynni og eisini a›ra sta›ni, t.d. í Klaksvík. Hugbur›urin hjá vinnuni tykist vera, at teir vilja vera vi› til at skapa karmarnar, solei›is at ta› framvegis skal vera møguligt hjá feløgunum í Klaksvík og Eysturoy og ø›rum, sum hava áhuga fyri tí, at spæla altjó›a dystir á Toftum. At setur nú ver›a sett upp ber vi› sær, at ta› framvegis ver›ur møguleiki at spæla altjó›a skrásettir landsdystir og Europa Cup dystir á Svangaskar›i, sigur Niclas Davidsen, forma›ur í Tofta Ítróttarfelag.

Ta› hevur veri› frammi fyrr í ár, at Tofta Ítróttarfelag hevur ætlanir um at leggja tak á ásko›araplássini kring grasvøllin.

– Vit hava framvegis ætlanir um at gera ta› arbei›i›, men ta› hevur ongantí› veri› ætlanin at fløkiliggera tann partin av projektinum í ár. Eg dugi ikki at siga, nær hetta ver›ur veruleiki, men vit arbei›a vi› søkini, sigur Niclas Davidsen.

jh

Slikka sárini í Englandi

Vónbrotnu onglendingarnir kenna seg sannførdar um, at størsta orsøkin til, at teir so rudduliga dumpa›u í royndini at vinna HM endaspæli› var fullkomuliga ótamdi atbur›urin hjá ensku vi›haldsfólkunum undir EM endaspælinum

Í fyrradagin var ta› greitt, at HM endaspæli› í 2006 ver›ur í T‡skalandi. T‡skararnir fegnast. Ta› er longu mest sum avgjørt, at fyrsti dysturin skal spælast á olympiska leikvøllinum í München, sum var tikin í n‡tslu, tá olympisku leikirnir vóru í München í 1972. Ta› er eisini avgjørt, at finalan skal spælast á olympiska leikvøllinum í Berlin, sum var› tikin í n‡tslu, tá Hitler í 1936 skipa›i fyri tiltiknu olympisku leikunum. Ætlanin er, at dystirnir skulu spælast á tólv vøllum kring alt T‡skaland, og fleiri av vøllunum skulu n‡mótans gerast. Millum a›rar teir bá›ir omanfyri nevndu olympisku leikvøllirnir.

Politikkurin

Tá ta› var greitt, at T‡skaland og ikki Su›urafrika ver›ur vertur í 2006, var› ta› mett um ein misálitisváttan til formannin í FIFA, Sepp Blatter. Hann hevur ikki dult, at fyri hann var ta› av stórum t‡dningi, at endaspæli› fyri fyrstu fer› skuldi ver›a í Afrika. Men hesum fekk hann ikki undirtøku fyri. Tólv atkvø›ur vóru fyri T‡skalandi, ellivu fyri Su›urafrika og ein var blonk. Blonku atkvø›una átti vónsvikni bretski umbo›sma›urin. Um hann hev›i atkvøtt fyri Su›urafrika, og ta› tískil hev›i sta›i› á jøvnum, so hev›i Su›urafrika vunni› telvingina, tí so hev›i atkvø›an hjá formanninum veri› avgerandi.

Mikudagin rokna›i Franz Bechenbauer ikki vi›, at T‡skaland hev›i nakran møguleika, og at endaspæli› tískil fór at enda í Su›urafrika. Afrika og Su›uramerkia høvdu sligi› seg saman vi› FIFA formanninum um at atkvø›a fyri Su›urafrika. Burtursæ› frá Onglandi ætla›u hinir sjey europeisku limirnir at atkvø›a fyri T‡skalandi, tí teir mettu eina avtalu vera um, at Ongland skuldi fáa EM endaspæli› í 1996 og T‡skaland HM endaspæli› í 2006.

Stu›ulin til Ongland var í Nor›uramerika og Oceanien. Asia ætla›i at atkvø›a fyri Marokko. Teir broyttu í sí›stu løtu stø›u og stu›la›u saman vi› UEFA T‡skalandi, sum tískil vann kappingina.

At Asia broytti stø›u seg›ist koma av, at asiatarnir eru illa í øgn vi› FIFA formannin. Teir vildu ikki, at hann skuldi fáa sín vilja, og tí lótu teir seg sjarmera› av Franz Bechenbauer og hansara monnum.

Rannsaka seg sjálvar

Í Onglandi ver›ur sagt, at átaki› um at fáa endaspæli› til Onglands – nógv orka var› løgd í hetta frá árskiftinum 1997/1998 og fram til í fyrradagin – kosta›i 10 milliónir pund ella einar 130 milliónir krónur. Nú spyrja onglendingar, hví ta› kiksa›i so miki› nógv, at Ongland datt úr kappingini, á›renn komi› var til sí›stu finaluna.

Í atkvø›ugrei›sluni hósdagin fekk Ongland onga atkvø›u úr Europa – burtursæ› frá tí einu, sum teir sjálvir eiga í a›alnevndini hjá UEFA. Í Onglandi halda tey, at høvu›sorsøkin til hesa stø›una er, at illavornu ásko›ararnir gjørdu so nógv um seg, tá EM endaspæli› fyrr í summar var í Hollandi og Belgia.

Men fyrireikararnir geva eisini skriva›u eingilsku pressuni skyldina. Me›an t‡ska pressan stó› aftanfyri t‡sku umsóknina og pressan í Su›urafrika stó› aftanfyri teirra umsókn, so royndi skriva›a pressan í Onglandi at láturliggera at at illteinkja eingilsku royndina, siga altso teir, sum stó›u fyri engilska átakinum.

Eyglei›arar halda, at nú fara ta› at ganga í minsta lagi› fjúrtan ár og kanska uppaftur fleiri, á›renn Ongland, sum í 1966 vann HM á heimavølli, aftur fer at fáa møguleikan at h‡sa endaspælinum. Í 2002 ver›ur endaspæli› í Asia (Japan og Su›urkorea), í 2006 í Europa (T‡skalandi), og so ver›ur ta› mett at vera sannlíkt, at Afrika (Su›urafrika) fær endaspæli› í 2010. Brasilia var inntil sí›sta mánadag áhuga› í at fáa endaspæli› í 2006. Teir tóku seg aftur og stu›la›u royndini hjá Su›urafrika. Tí er einki at ivast í, at Afrika fer at stu›la einari brasilskari royndar at fáa endaspæli› í 2014, og so noy›ist Ongland í hvussu so er at bí›a inntil 2018!

jh

KÍ fyrireikar seg á Svangaskar›i

Tveir fyrrverandi 1. li›sspælara eru komnir aftur í besta hópin hjá klaksvíkingum

Mikukvøldi› í komandi viku skal KÍ í europeiska eldin. Klaksvíkingar vera teir einastu, sum skulu royna seg nú beinanvegin. Fyrsta innlei›andi umfari› í meistarakappingini ver›ur spælt í komandi viku og í a›ru viku. Innlei›andi umførini í UEFA Cup kappingini, har GÍ og B36 skulu taka lut, ver›a ikki fyrrenn í august.

Klaksvíkingar høvdu bara eina viku summarste›g. Onkrir spælarar, i› Tomislav Sivic metti ikki vóru heilt so væl fyri sum hinir, vandu eisini í vikuni eftir vónbroti› í Runavík. Hinir spælararnir komu til venjingar aftur næstsí›sta mánakvøld, og sí›ani tá hevur veri› lív í á vøllinum í Klaksvík so at siga hvørt kvøld.

Í gjárkvøldi› fór KÍ á Svangaskar›, har teir skuldu ste›ga til í kvøld. Teir venja á grasvøllinum, og teir búgva í ítróttarhúsinum.

Europa Cup dysturin hjá KÍ á heimavølli ver›ur á Svangaskar›i mikukvøldi› klokkan 19.00. Mótstø›uli›i› ver›ur Rey›a Stjørnan úr Beograd, sum venjarin hjá KÍ, Tomislav Sivic, kennir væl til. Í ungdómsárunum vandi og spældi hann vi› høvu›ssta›arfelagnum.

Kend andlit

Ta› eru nógvir um bo›i› til Europa Cup hópin og harvi› pláss ímillum teir fyrstu ellivu. Allir teir, sum vóru vi› undan summarste›ginum, hava vant hesar bá›u sí›stu vikurnar. Undantøkini eru tríggir av teimum ungu spælarunum, sum í hesi vikuni hava veri› vi› u–17 landsli›num í T‡skalandi. Teir eru Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør og Símun Joensen, sum koma til Føroyar aftur í dag.

Tveir spælarar, sum ikki hava veri› á besta li›num hjá KÍ fyrr í ár, men sum eru kend fótbóltsandlit í Klaksvík, hava vant vi› besta li›num sí›ani summarste›gin. Talan er um Ey›un Klakkstein, sum var nógv vi› eftir summarste›gin í fjør, og um Allan Joensen.

Allan var sjey fer›ir á landsli›num mi›skei›is í nítiárunum, og tá Jóannes Jakobsen var venjari í Klaksvík, vóru tey nógv, sum mettu Allan at vera ein tann stinnasta spælaran í landinum. Trupulleikar vi› hælsinuni hava havt vi› sær, at evnaríki og raski mi›vallarin og mi›verjin als ikki spældi í 1. deild í fjør, og hann hevur heldur ikki spælt higartil í ár.

Undan summarste›ginum spældi Allan Joensen onkran dystin í 3. deild og í 2. deild, og nú roynir hann eina fer› enn, um førleikin aftur er til fótbóltsspæl á hægsta stø›i. At evnini og viljin eru til ta›, er einki at ivast í.

jh

Allan Joensen

Taptu í brotssparkskapping

U–17 landsli›i› hev›i møguleikan í vanligu leiktí›ini at vinna fjór›ingsfinaluna, men teir fingu einki mál, og so taptu teir 6–5 í brotssparkskappingini

Føroysku fótbóltsspælararnir, sum í hesi vikuni hava veri› í Leipzig í T‡skalandi, og sum í dag koma aftur til Føroya, vóru sera vónbrotnir og harmir í fyrrakvøldi›. Seinnapartin høvdu teir spælt fjór›ingsfinalu í 100 ára jubileumskappingini hjá t‡ska fótbóltssambandinum, og ta› spældi ikki væl av.

– Spælararnir vóru ógvuliga vónbrotnir, tá teir eftir brotssparkskapping høvdu mist møguleikan at halda fram í kappingini. Og eg skilji teir væl. Eg haldi, at slovakiska mótstø›uli›i› – ta› kallast BSK Bardejov – ikki var so gott, sum tey bæ›i li›ini, sum vit frammanundan høvdu vunni› ímóti. At okkara spælarar ikki megna›u at vinna í vanligu leiktí›ini komst partvís av, at teir misn‡ttu tríggjar gó›ar møguleikar og partvís av, at ta› sást aftur í avrikinum, at teir bara høvdu hvílt í gó›ar tveir tímar sí›ani seinasta dyst, me›an mótstø›umenninir høvdu hvílt í fimm tímar. Hetta var harmuligt, men ta› er einki at gera vi› ta›. Nú koma spælararnir heim aftur til Føroya at venja og spæla, og so síggja vit fram til t‡dningarmiklu avbjó›ingina, sum ta› ver›ur, tá vit í oktober skulu til Italia at spæla í EM undankapping ímóti Italia, Onglandi og Andorra.

Hetta seg›i Jógvan Martin Olsen úr Leipzig fyrrapartin í gjár. Tá tóktust spælararnir, sum venjarin heldur vera sjáldsama nógv ey›kendir av viljanum at vinna, ikki komnir rættuliga fyri seg eftir vónbroti›.

Í fyrrakvøldi› fór føroyska fer›alagi› av tjaldplássinum, har teir høvdu hildi› til, og í bleytar sengur á einum gistingarhúsi, og har høvdu teir møguleika at hvíla seg.

Dystargongdin

Eftir tvær fer›ir ein málleysan hálvan tíma var› spælt tvær fer›ir tíggju minuttir, men ta› stó› framvegis á jøvnum.

So var ney›ugt vi› brotssparkskapping, og tá vann BSK Bardejov 6–5. Eftir at bá›ir partar høvdu havt fimm royndir í part úr ellivu metrum, stó› ta› á jøvnum 4–4. Føroyingar misn‡ttu fyrsta sparki›, og slovakarnir misn‡ttu fjór›a sparki›. Sjeyndi føroyingurin misn‡tti, og tá sjeyndi mótstø›uma›urin hev›i skora›, var ta› greitt, at føroyska li›i› onga framtí› hev›i í hesi kappingini.

Teir, sum skora›u í brotssparkskappingini, vóru Bjarni Jørgensen, Símun Joensen, Hjalgrím Elttør, Vagnur Mohr Mortensen og Hanus Eliasen. Atli Danielsen átti fyrstu føroysku royndina, og Gilli Haraldsen átti sí›sta føroyska sparki›.

Føroyska manningin var tann sama, sum hon var í so at siga allari kappingini: Pól Næs Joensen, B36 – Jann Ingi Petersen, B68, Vagnur Mohr Mortensen, HB, Jón Rói Jacobsen, HB, Áki Leitisstein Hansen, NSÍ – Gilli Haraldsen, Haderslev, Hjalgrím Elttør, KÍ, Símun Joensen, li›forma›ur KÍ, Elfinn Ørvarodd, FS Vágar – Bjarni Jørgensen, HB, Fró›i Jóanesarson, NSÍ.

Atli Danielsen úr KÍ avloysti í 40. minutti Áka Leitisstein Hansen, og í 42. minutti avloysti Hanus Eliasen úr ÍF Fró›a Jóanesarson.

jh

Bíligari atgongumerkir

FSF og Postverki› selja nú atgongumerki til landsdystin ímóti Danmark, sum ver›ur á Tórsvølli 16. august

Næsta royndin hjá fótbóltslandsli›num ver›ur 16. august á Tórsvølli. Mótstø›uli›i› ver›ur danska landsli›i›, og høvi› er NM kappingin, sum sjøtul var› settur á ni›ri í Spania sí›sta vetur.

Einki er at ivast í, at áhugin fyri uppger›ini millum Føroyar og Danmark ver›ur stórur. Ein orsøk er serligu vi›urskiftini, sum altí› hava veri› og sum eru millum Danmark og Føroyar. Ein onnur orsøk er, at talan ver›ur um fyrsta landsdystin hjá Danmark, eftir at Morten Olsen hevur tiki› vi› venjarastarvinum og eftir at Michael Laudrup er vor›in hjálparvenjari. At Allan Simonsen samstundis er venjari hjá føroyska li›num eigur ikki at gera áhugan minni hjá millum danir og harvi› serliga hjá donsku pressuni.

Fótbóltssamband Føroya og Postverki› eru longu farin undir at selja atgongumerki í forsølu til landsdystin ímóti Danmark. Atgongumerkini eru at fáa á posthúsunum kring alt landi› og hjá avgrei›slupostbo›unum.

Í forsølu skulu vaksin rinda 140 krónur og børn millum átta og sekstan ár 40 krónur. Børn yngri enn átta ár sleppa – um tey fylgjast vi› vaksnum – ókeypis til dystin.

Forsølan endar 11. august. Tveir tímar undan dystarbyrjan 16. august (dysturin ver›ur spældur klokkan 19.00) fer at bera til at keypa atgongumerkir vi› vøllin, men tá ver›ur talan um ein annan prís. Tá skulu vaksin rinda 170 krónur og børn millum átta og sekstan ár 50 krónur.

jh